## Vectra 2,0 GTS turbo



Opel Vectra 2,0 GTS turbo, við aluminiumsmotori og 6 trins girkassa, verður sýndur fram á bilaframsýningini í Geneve í mars. Bilurin hevur 175 hk, koyrir frá 0-100 km/t uppá 9,1 sek. bensinnýtslan er 11,2 km/l og toppferðin er 230 km/t.

*Kelda: GM Danmark/ tíðindaskriv*

## Touran í vár



VW Touran verður nú framleiddur og kemur á marknaðin í vár. Touran er ein mini-MPV við upp til sjey sitiplássum. Bilurin er í sama klassa sum eitt nú Renault Scenic og Opel Zafira.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Fiesta í Kina



Ford Fiesta verður nú eisini framleiddur í Kina. Bilurin er heilt eins við evropeisku útgávuna. Árliga framleiðslan verður 50.000 bilar.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Audi A3 skift stíl

*Nýggi Audi A3 sum kemur á marknaðin í summar. Størsti motorurin er ein 3,2 litur V6 við 241 hk.*





*A3 sær nú meira lættur og sportligur út. Hjólini verða 16 ella 17", alt eftir hvat útgáva bilurin er*



*Innan verur A3 nú meira sportligur við sportsetrum og alu-look luftdysum í instrumentborðinum*

**Audi A3, ið fyrstu ferð kom á marknaðin í 1996, verður nú avloystur av einum nýggjum A3, ið verður ein meira sportsligur bilur við 4 og 6 syl. motorum við upp til 241 hk. Bilurin kemur á marknaðin í summar.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hóast nýggi Audi A3 líkist sær sjálvum, er talan um ein størri bil við meira sportligum designi og koyrieginleikum. Undirvognurin er konstrueraður til at geva bilinum sportligar koyrieginleikar og betri stabilitet í svingum. Eisini hevur A3 "multi-link-bakaksil" og møguleika fyri 4x4 Quattro. Lættmetalfelgurnar verða 16" ella 17", alt eftir hvat útgáva bilurin er. Í fyrstu atløgu kemur bilurin við 1,6 litur 148 hk bensin og 2,0 TDI 140 hk dieselmotori. Seinni kemur hann eisini við 1,9 litur 105 hk diesel og 3,2 litur V6 bensinmotori við 241 hk. Innan verður A3 nú meira sportligur við sportsetrum og alu-look luftdysum á instrumentborðinum og eini smartari gardanboks. Sum nakað nýtt kemur A3 nú við elektromekaniskum róðurgreiðum og servostýring sum tillagar seg ferðina. Bilurin kemur á danska og føroyska marknaðin í summar.

# FDM ráðstevna í Barcelona

**Tá eitt føroyskt ferðalag herfyri var í Barcelona, í samband við at ein nýggjur Mazda bilur bleiv sýndur fram, var eisini ein FDM ráðstevna í býnum. Talan var tó ikki um felagsskapin, Forenede Danske Motorejere**




*Á einum stórum kongressbygningi í Barcelona vísti hetta skelti at FDM hevði ráðstevnu har. FDM stóð fyri "Forum Dental Mediterraeo"*

FDM
*Magnus Gunnarsson*

Á einum stórum kongressbygningi í Barcelona vísti eitt skelti, at FDM hevði ráðstevnu har. Tað vísti seg tó, at talan ikki var um danska FDM, Forenede Danske Motorejere, ið nógvir føroyingar eru limir í. Í hesum føri stóð FDM fyri "Forum Dental Mediterraeo". Ivaleyst ein ráðstevna um tenn og tannarøkt sum var í døgunum frá 23 - 25 januar. Her hjá okkum hevur FDM eisini staðið fyri "Føroyskir Danskir Motoreigarar".

# ítróttur

Nr. 30 • hósdagur • 13. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



*Bæði TB og ÍF hava verið uttanfyri landoddarnar eftir leikarum til steypafinaluna leygardagin*

*Mynd: Savnsmynd*

Kvinnufinalan:

## Úr Brasil og Danmark - men alt opið

Nógv verður lagt fyri, tá meistaradeildarliðini hjá kvinnum hjá ÍF og TB bresta saman í høllini á Hálsi leygardagin kl. 14,30.

ÍF heintar leikara heim úr Brasil og TB heintar leikar heim úr Danmark.

Beint eftir at ÍF hevði tryggja sær pláss í steypafinaluni, fór Sóley Philbrow hjá ÍF til Brasilia, men fyri at kunna leika við fullari styrki, hava ÍF-kvinnunar fingið Sóley heim aftur til Føroya av suðurhálvkúluni, soleiðis at hon kann leika við leygardagin.

Og í suðri hevur eisini verið arbeitt seinastu tíðina fyri at styrkja um liðið. Juanna Joensen, sum fyrr í ár hevur leikt við elitudivisiónliðnum Åbyhøj í bestu donsku deildini, kemur eisini heim til finaluna. TB hevur fyrr í ár sett seg í samband við Juannu, og játtaði hon at leika við, og tí mátti hon gevast at leika í Danmark í byrjanini av januar í ár.

### ÍF hægri og eldri

Sum hjálagda yvirlit yvir leikarnar sýnir, so hevur ÍF eftir aldrinum at døma eitt meira roynt lið, tí miðalaldurin hjá teimum er 24,2 ár í mun til 19,8 ár hjá TB. Elsti leikari hjá ÍF er 35 ár og hjá TB 28 ár, meðan ynskti leikari hjá ÍF er 16 ár og tann ynskti hjá TB er 15 ár.

Miðalhæddin hjá ÍF er eisini hægri, og er miðalhæddin hjá teimum 173,5 cm í mun til 171,5 cm hjá TB. Hægsti leikarin hjá ÍF er 183 cm og lægsti 163 cm, meðan hægsti leikarin hjá TB er 182 cm og lægsti 159 cm.

### TB betri fyri í landsdystum

Um hugt verður eftir, hvør hevur flestar landsdystir, so er TB væl betri fyri. Á ÍF liðnum er tað bert Randi Larsen, sum hevur verið á landsliðnum, meðan tað hjá TB eru 5 leikarar sum hava leikt altjóða dystir við landsliðum. Flestar dystir hevur Gudrid Nolsøe leikt, íalt 21, og síðani kemur Juanna Joensen við 18 og Svanna Nielsen við 9. Eisini útlendsku leikararnir hjá TB, systrarnar Marina og Maja Popovic hava leikt 5 landsdystir í part fyri Bosnia. So á hesum økinum er TB betri fyri.

### Tveir útlendingar í part

Bæði liðini hava tveir útlendskar leikarar í part á liðunum. TB hevur sytrarnar sum eru nevndar omanfyri, meðan ÍF hevur Marija Ninkov og Nikolna Alter. Serliga tann seinna hevur gjørt nógv um seg í landskappingini í vetur, og roknast kann við, at nógv hvílir á hennara herðum leygardagin.

Tað verður eisini spennandi at síggja um Maja Popovic fer at leika sum áleypari ella hevari í finaluni, tí vanliga leikar Juanna Joensen hevari í Danmark, meðan Maja hevur leikt hetta pláss her heima.

### Ringt at meta um úrslitið

Sum tað framgongur frammanfyri, verður tað ringt at meta um úrslitið av dystinum, men um hugt verður eftir teimum seinastu dystunum, sum liðini hava leikt sínamillum, so hevur ÍF fyrimun av hesum, tí tær hava funnið teir flestu, og tí liggja tær eisini á 2. plássi í landskappingini framanfyri TB.

Og tá so talan er um eina steypafinalur kann alt henda, og tí vilja vit her ikki spáa um nakran vinnara.

Á heimasíðuni hjá FBF (www.fbf.fo) er ein quick-poll kanning, og á henni verður tippað, at tað verður TB, sum vinnur finaluna (54 um kvøldið 11. februar).

### Reka til Havnar

Eftir hvat frættist av Tvøroyri og úr Fuglafirði, so verður dugliga rikið, fyri at fáa áskoðarar til Havnar leygardagin, og frá báðum støðum verður fyriskipaður felags flutningur. Um tað er onkur sum ætlar sær til Havnar at hyggja eftir dystinum, sum byrjar kl. 14,30 leygardagin, frætta tey uttan iva um hetta seinni í vikuni.

**TB**

| Nr. | Navn | Leikpláss | Hædd | Aldur | Landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sára Strøm | Kantur | 169 | 15 | 0 |
| 2 | Ingun Midjord | Miðja | 182 | 18 | 0 |
| 3 | Gudrid Nolsøe | Kantur | 171 | 21 | 21 |
| 4 | Sólva Dimon | Kantur | 162 | 14 | 0 |
| 5 | Marina Popovic | Kantur | 175 | 23 | 5 (Bosnia) |
| 6 | Harriet Hammer | Libero | 160 | 21 | 0 |
| 7 | Matja Popovic | Hevari/Kantur | 175 | 21 | 5 (Bosnia) |
| 8 | Kristina Steinkross | Hevari | 159 | 16 | 0 |
| 9 | Gudrid Dimon | Diagonal | 172 | 18 | 0 |
| 10 | Juanna Joensen | Hevari | 175 | 23 | 18 |
| 11 | Torbera Joensen | Miðja | 176 | 19 | 0 |
| 12 | Svanna Nielsen | Miðja | 182 | 28 | 9 |

**Venjari Gudrid Nolsøe**
Hjálparvenjari: Chris N. Petersen
Liðformaður: Svanna Nielsen
Liðleiðarar: Romica Øster og Anne-Mia Johannesen

**ÍF**

| Nr. | Navn | Leikpláss | Hædd | Aldur | Landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sóley Philbrow | Kantur | 182 | 22 | |
| 2 | Rønn Eliasen | Libero | 168 | 32 | |
| 3 | Marija Ninkov | Miðja | 183 | 27 | |
| 4 | Katrin Olsen | Diagonal | 168 | 35 | |
| 5 | Randi Larsen | Hevari | 168 | 35 | 15 |
| 6 | Nikolina Alter | Kantur | 180 | 21 | |
| 7 | Anna Maria Kruse | Kantur/Miðja | 178 | 21 | |
| 8 | Annika Rasmussen | Miðja | 172 | 26 | |
| 9 | Fríða Næs | Kantur/Diagonal | 163 | 17 | |
| 10 | Sandra Kallsoy | Kantur | 173 | 19 | |
| 12 | Ásla Joensen | Miðja | 174 | 19 | |
| 13 | Herborg Jøkladal | Miðja | 173 | 16 | |

**Venjari: Boban Ilic**
Liðformaður: Randi Larsen
Liðleiðari: Eilif Eliasen